Kanjon Betongsøla
Oyravegur 47
700 Klaksvik

Argir, hin 25. november 2009
Málnr.: 09/000131-7
Málsviðgeri: LZ

# Umhvørvisgóðkenning

av

## sp/f Kanjon

## betongblandistøð

Henda umhvørvisgóðkenning av betongblandistøðini hjá Sp/F Kanjon, matr. nr. 766b í Klaksvík, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

### 1 Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

### 2 Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 10. Nov. 2008 umsókn um umhvørvisgóðkenning av betongblandistøðini hjá sp/f Kanjon í Klaksvík (US-41201-007/08-3)

Seinni hevur Umhvørvisstovan móttikið tekningar, sum sýna framleiðslu, innrætting og botnfellingarbrunn.

Tað móttikna tilfarið hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsókníni.

### 3 Lýsing av virkinum

Virkið er á matr. nr. 766b í Klaksvík.

Sement verður móttikið og goymt í sementsilo. Framleiðslan av betongi fer fram á tann hátt, at sement, sandur, skervur og møgulig tilsetingarevni, sosum luftíblandievni og superplastifiseringsevni, og vatn verður koyrt í betongbil og blandað og síðan koyrt út til kundan.

Virksemið fevnir um:

1) Blanding og útkoyring av betong umframt goymsla av sementi, sandi og skervi.
2) Vasking av betongbilum.
3) Goymslu av rávørum.

## 4 Viðgerð

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til p/f Kanjon og Klaksvíkar kommunu til viðmerkingar.

Ongin hevði nakra viðmerking.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á dustútleiðing, spillivatnsútleiðing og goymslu av rávørum.

Framleiðsla av betongi hevur við sær útleiðing av sementdusti og spillivatn frá framleiðslu av betongi og vaski av betongbilum.

Spillivatn frá vaskiplássinum til betongbilar skal leiðast í ein botnfellingarbrunn. Um spillivatnið í inniheldur olju, skal tað leiðast gjøgnum ein rætt dimensjoneraðan oljuskiljara ella aðra hóskandi reinsiskipan og víðari í kommunala spillivatnsútleiðing.

## 5 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum. Harumframt eru **góðkenningartreytirnar í fylgiskjali 1** galdandi.

Um ósamsvar er millum treytirnar niðanfyri og treytirnar í fylgiskjali 1, eru treytirnar niðanfyri galdandi.

Góðkenningartreytir:

a) Tætt undirlag skal vera á økinum har betongframleiðslan og vask av bilum fer fram. Botnfellingarbrunnur skal gerast, soleiðis at alt vatn, sum inniheldur botnfelliligt evni, verður reinsað.
**Freistin til at fáa hetta í rættlag er 1. august 2010.**

b) Botnfellingarbrunnurin skal tømast eftir tørvi. Um botnfallið ikki verður endurnýtt, skal tað avvatnast og latast góðkendum móttakara.

c) Vatn frá vaski av bilum skal leiðast í reinsiskipan, sum tryggjar at betongslam og møgulig olja ikki verður leitt út.

d) Restir av blandaðum betongi skal goymast á hóskandi staði, áðrenn tað verður endurnýtt ella latið góðkendum móttakara.

e) Reingerðarevni ið verða nýtt til vask av bilum, skulu vera skjótt separerandi reingerðarevni, soleiðis at møgulig olja kann haldast aftur.

f) Spillivatnið skal vera so væl reinsað fyri føst evni o.a. at tað ikki tippir rørleiðingina.

g) Sýni skulu takast av spillivatninum, ið verður leitt út. Sýnini skulu takast úr sýnistøkubrunni eftir reinsiskipanina og meðan virkið er í fullum rakstri.
Kannast skal um treytirnar í pkt. 5.4 í fylgiskjalinum eru loknar.

h) Í **september og desember í 2010 og í mars 2011**, skulu sýni takast av spillivatninum.
Spillivatnið skal kannast fyri:
   - Olju (mineral)
   - Suspendera evni
   - Botnfelliligt evni
   - pH-virðið
   - Chrom total

   Aftaná at Umhvørvisstovan hevur móttikið úrslitini frá hesum kanningum verður støða tikin til, um neyðugt er við framhaldandi kanningum.

i) Um markvirðið fyri innihald av olju(mineral) ikki er yvirhildið, skal spillivatnið reinsast í einum rætt dimensjoneraðum oljuskiljara ella aðrari hóskandi reinsiskipan.

j) Á sementsilo skal vera filtur, sum loyvir í mesta lagi 25 mg av dusti pr. $m^3$ av luft.
k) Sýni skulu kunna takast av luftútleiðingin frá sementsilo.
l) Sum partur av innaneftirlitinum, skal regluligt eftirlit vera við dustfiltrum og spillivatnsreinsiskipanini, í minsta lagi eina ferð um árið. Virkið skal hava skrivliga mannagongd fyri eftirlitinum, so sum títtleika, eftirlitsskjøl o.a.
m) Virkið skal gera árliga umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti herundir møgulig óhapp, gjørd og ætla umhvørvistiltøk, eftirlit við reinsiskipanum, tøming av brunnum o.a. og senda hana til Umhvørvisstovuna í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 6 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til Innlendismálaráðið saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Klaksvíkar kommunu, N. Pálsgøta 32, FO-700 Klaksvík
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn

**Hjálagt:** Fylgiskjal 1.

**Fylgiskjal 1**

# Góðkennningartreytir

## 7 Innrætting og rakstur

7.1 Virkið skal rekast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

7.2 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.

7.3 Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar.

7.4 Miðast skal eftir at nýta evni og tilfar, ið hava minst møguligt árin á umhvørvið.

7.5 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

## 8 Goymslur

8.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.

8.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

## 9 Óljóð, ristingar og ljós

9.1 Óljóð[2] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1:** Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| 1. Dagur | 2. Tíð | 3. Øki 1 | 4. Øki 2 | 5. Øki 3 | 6. Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Ley | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Ley | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

9.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

9.3 Virksemið skal ikki hava við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

## 10 Útleiðing til luft

10.1 Virksemi má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.

10.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

10.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 11 Spillivatn

11.1 Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðingina

---

[1] Best Available Techniques.
[2] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

11.2 Eru dálkandi evni í spillivatninum, skal ein hóskandi reinsiskipan nýtast, so sum olju- ella feittskiljari.

11.3 Reinsiskipanir til spillivatn skulu reinsast og røkjast soleiðis, at tær altíð virka til fulnar.

11.4 Tað skal vera gjørligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum.

11.5 Spillvatnið skal yvirhalda markvirðini í talvu 2.

**Talva 2:** Markvirði fyri spillivatn

| Evni | Markvirði |
|---|---|
| Olja (mineral) | Max. 10 mg/l |
| Olja/feitt | Max. 50 mg/l |
| Botnfelliligt evni | Max. 10 ml/l |
| Suspenderað evni | Max. 300 mg/l |
| pH | 6 - 9 |

## 12 Burturkast

12.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[3].

12.2 Burturkast skal goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa.

12.3 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

## 13 Óhapp

13.1 Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

13.2 Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.

13.3 Virkið skal, um neyðugt, hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.

13.4 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

13.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[4].

## 14 Innaneftirlit

14.1 Virkið skal altíð  tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

14.2 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar í 3. parti, um óljóð, ristingar og ljós, í 4. parti, um útleiðing til luft, og í 5. parti, um spillivatn, verða hildnar.

14.3 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

14.4 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.

14.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av virkinum.

---

[3] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, og kunngerð nr. 40 frá 09-04-1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni, seinni broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 15 Rakstrarskráseting

15.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd og slag av rávørum og kemikalium. Databløð fyri øll kemikaliu skulu verða tøk.
- El- og oljunýtsla.
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti við tilskilan av slagi og móttakara.
- Røkt av reinsiskipanum.
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær.
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit.

15.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá Umhvørvisstovuni.

15.3 Virkið skal eftir umbøn frá Umhvørvisstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi uppseting.

15.4 Umhvørvisstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir 15.1

## 16 Almennar treytir

16.1 Boðast skal Umhvørvisstovuni frá, tá ið farið verður undir virksemið.

16.2 Gongur meiri enn eitt ár, áðrenn farið er undir ætlanina, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

16.3 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

16.4 Góðkenningin skal altíð vera tøk á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

16.5 Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni.

16.6 Umhvørvisstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

16.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

16.8 Aftan á fimm ár kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

16.9 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum.